# Smyril Line missir milliónir

**Sølan av tollfríum sigarettum umborð á Norrønu er ein týðandi inntøkukelda, og kunngerðin um bann av innflutningi av tollfríum sigarettum verður ein dyggur smeitur fyri Smyril Line, sum longu hevur eina tronga fíggjarætlan**

TOLLFRÍ SØLA
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Tá kunngerðin um bann av innflutningi av tollfríum tubbaki kemur í gildi tann 1. oktober, verður tað steinur omaná byrðu hjá Smyril Line. Serliga er tað sølan av tubbaki, sum hevur stóran týdning fyri raksturin á Smyril Line, tá henda er umleið átta prosent av inntøkunum av tollfríu søluni. Í reiðum peningi merkir hetta, at Smyril Line kemur at missa umleið seks til sjey milliónir krónur árliga.

- Hetta verður ein dyggur smeitur fyri okkum. Vit hava longu eina tronga fíggjarætlan við høgum oljuprísum og matvørðuprísum, og hetta kemur sum steinur oman á byrðu hjá Smyril Line, sigur Jákup Sverri Kass, sum er sølu- og marknaðarstjóri hjá Smyril Line.

### Fáa einki ístaðin

Avgerðin hjá landsstýrinum at seta kunngerðina um bann av innflutningi av tollfríum tubbaki fáa álvarsamar fylgjur fyri vinnuna. Trupulleikin er at bæði Smyril Line og Atlantic Airways missa milliónaupphæddir árliga, og at tey fáa einki í staðin.

- Karsten Hansen segði tá hann legði uppskotið fram upprunaliga, at vinnan mátti laga seg til umstøðurnar, og ístaðin mátti hon bara finna uppá onkran annan hátt at vinna pening, men tað er ikki bara sum at siga tað at finna uppá okkurt annað at gera ístaðin. Henda møguleikan høvdu vit langtsíðan troytt, um ein slíkur bara lá og bíðaði eftir at vit tóku hann, vísir Jákup Sverri Kass á.

Vinnan fær einki at seta ístaðin fyri hesar inntøkurnar, og samstundis hevur hon sera trupult við at fáa endarnar at røkka saman, nú oljuprísirnir eru vornir somikið nógv dýrari.

- Taka vit eitt nú ES, har líknandi broytingar eru framdar, so hava tey fingið nakað ístaðin. Har hava fólk tildømis loyvi til at flyta so nógv inn av tollaðum sigarettum, sum tey hava hug til, men her er støðan enn tann sama, at tú hevur bert loyvi at hava tvey kartengur við í land. Vit hava einki fingið at seta ístaðin, greiðir Jákup Sverri Kass frá.

### Vilja hava longri freist

Størsti trupulleikin við at kunngerðin kemur í gildi nú, er at freistin hjá vinnuni at tillaga seg er ov stutt. Um vit taka eitt nú ES, so fekk vinnan har umleið 5 til 6 ár at tillaga seg í. Hetta merkti, at tey fingi góða tíð til at leggja nýggjar strategiir og finna ella skapa nýggjar inntøkukeldur, áðrenn kunngerðin kom í gildi.

- Eftir upprunaliga uppskotinum hjá Karsten Hansen, fekk vinnan 14 dagar at tillaga seg í. Hetta fingu vit tíbetur broytt til 3 mánaðir, men hetta er heldur ikki nóg góð tíð. Vit vildu ynkst, at vit fingu eini 3 til 5 ár til at tillaga okkum kunngerðini, soleiðs at vit eisini fingu tíð til at skapa nýggjar inntøkukeldur og tillaga virksemið annars, vísir Jákup Sverri Kass á.

- Hjá okkum er ikki so nógv at gera við hetta, men vit mugu bara vóna at Bjørt Samuelsen, landsstýriskvinna í vinnumálum, klárar at skera ígjøgnum og fáa Karsten Hansen at umhugsa støðuna enn einaferð, sigur Jákup Sverri Kass at enda.



# Kann gerast neyðugt at hækka prísin



**Fær Atlantic Airways onga alternativa inntøkukeldu ístaðin fyri tollfríu søluna umborð, kann gerast neyðugt hjá felagnum at antin hækka ferðaseðlaprísirnar ella minka um tænastustøðið**

TOLLFRÍ SØLA
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Sølan av tollfríum vørum hevur verið ein integreraður partur av rakstrargrundarlagnum hjá flutningsfeløgunum, tað verði seg sjóvegis ella loftvegis flutning. Hetta sama er galdandi fyri Atlantic Airways, har sølan av tollfríum vørum hevur verið við til at halda ferðaseðlaprísunum niðri og tænastustøðinum uppi.

Inntøkurnar av tollfríu søluni av tubbaki hevur verið umleið 10 prosent av rakstrinum í rutunetinum hjá Atlantic Airways seinastu árini, og henda stórar broytingar í inntøkugrundarlagnum hjá felagnum, kemur hetta sjálvsagt at ávirka raksturin í felagnum.

### Kann ávirka prísin á ferðaseðlum

Kemur kunngerðin um bann av innflutningi av tollfríum tubbaki í gildi tann 1. oktober, og tað ikki eydnast Atlantic Airways at fáa eina alternativa inntøkukeldu, kunnu avleiðingarnar verða álvarsamar.

Magni Arge sigur, at felagið áður hava biðið um at fáa flutt tollfríu søluna í land til tess at minka um $CO_2$-útlátið og fyri at spara brennievni. Hetta var tá noktað teimum, men nú hevur P/F Vága Floghavn bjóðað rættindini til at hava tollfría sølu í Vága Floghavn út.

- Vit vóna framvegis at tað fer at eydnast hjá okkum at fáa flutt tollfríu søluna í land, og vit fara at liggja framvið at fáa rættindini til at hava tollfría sølu í Vága Floghavn. Tað er av stórum týdningi, at pengarnir verða verandi í samferðslukervinum, sum longu er undir trýsti, men eydnast hetta ikki, kunnu avleiðingarnar gerast álvarsamar, ikki bert fyri felagið, men eisini fyri ferðafólkini, sigur Magni Arge, stjóri í Atlantic Airways.

### Stóran týdning fyri raksturin

Í hálvársfrágreiðingini hjá Atlantic Airways fyri 2008 stendur at lesa, hvønn týdning tollfría sølan hevur fyri raksturin í felagnum. Har stendur millum annað at: »Tollfría sølan er týðandi partur av rakstrargrundarlagnum hjá Atlantic Airways. Verður grundarlagið undir hesum rakstri broytt munandi, so minkar eisini búskaparliga grundarlagið fyri rakstrinum. Hetta kann einans vinnast innaftur umvegis hækkandi ferðaseðlaprísir.«

Afturat hesum stendur eisini at: »Higartil eru ikki framdar broytingar í sambandi við, at Vága Floghavn er flutt í eitt partafelag. Tað er felagsins vón, at flogfelagið og Vága Floghavn fáa í lag góð samstarvsviðurskifti, sum tæna báðum pørtum og harvið eisini teimum ferðandi. Tað er umráðandi heldur at hugsa um samskipan, sum kann spara rakstrarkostnað heldur enn at hækka ferðagjøld fyri brúkararnar.«

Útfrá hesum er týðiligt, at eydnast tað ikki Atlantic Airways at finna aðra alternativa inntøkukeldu, sum kundi verið rættindini at hava tollfría sølu í Vága Floghavn, verður neyðugt at hækka ferðaseðlaprísin, minka um tænastustøðið ella bæði.

### Alt ov stutta freist

Magni Arge heldur eisini, at freistin, sum vinnan hevur fingið frá landsstýrinum at tillaga seg í, er alt ov stutt. Um tað eru 14 dagar, sum upprunaliga var ætlanin, ella um tað verður tríggir mánaðir, er næstan líka mikið.

- Freistin er alt ov stutt. At vit ikki fáa neyðugu tíðina til at tillaga okkum nýggju viðurskiftinum, sum koma í gildi 1. oktober, kemur at hava stóra ávirkan á raksturin hjá felagnum. Verður búskapargrundarlagið broytt, og ein integreraður partur av rakstrargrundarlagnum hvørvir úr samferðslukervinum, so henda stórar broytingar. Tað hevur víst seg í seinastuni at ágangurin móti flutningsfeløgunum hevur verið stórur, men tað er mín vón at Bjørt Samuelsen fær ávirkað avgerðina hjá Karsten Hansen, sigur Magni Arge at enda.